ÚTBJÓÐING

## ENDURLÝSING: Útbjóðing av nýggjari høvuðsvatnleiðing til Landssjúkrahúsið

Við hesum verður arbeiðið at leggja nýggja høvuðsvatnleiðing frá J.C. Svabos gøtu fram til bygning 13 (C-bygningin) og bygning 22 (B-bygningin) á Landssjúkrahúsinum boðið út í almenna lisitatión.

Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um:

- Upptøku av verandi betongflísum fram við bygningi 13
- Grevstrararbeiði fyri nýggjari vatnleiðing, um 70 metrar
- Leggja nýggja vatnleiðing, um 70 metrar
- Sveisa rustfrí stálrør í tøknirúmið í bygningi 22
- Endurgerð av lendi, so sum tyrving og endurlegging av verandi betongflísum

Lisitatiónin verður á Landsverki, Tinghúsvegi 5, mánadagin 21. mars 2011 kl. 14.00.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast frá mánadegi 28. februar 2011 við at venda sær til:

Landsverk
Tinghúsvegur 5
Postsmoga 78
FO-110 Tórshavn
btl@lv.fo

SENDISTOVAN

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, 110 Tórshavn | Tel. 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er stovnur undir Innlendismálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvøllir, herundir tyrlupallar.*






**Altíð tað nýggjasta**



# ÁRSAÐALFUNDUR

**Boðað verður til ársaðalfundar í Ognarfelag Tryggingartakaranna**

**fríggjadagin 11. mars 2011 kl. 17.00 á Hotel Føroyum**

**Dagsskrá:**

1. Frásøgn nevndarinnar um virki felagsins í farna roknskaparári.
2. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar og hvussu møguligt avlop ella tap, sambært roknskapinum, verður nýtt, sí § 29, stk. 3, í viðtøkum felagsins.
3. Val av nevndarlimum.
4. Val av grannskoðarum.
5. Møgulig uppskot, ið nevndin, stjórnin ella umboðsfólk ynskja at viðgera, og eru til fundin komin inn uppskot um at broyta viðtøkurnar um val til umboðsráðið, valskeiðið og valbærið fyri nevndarlimir.
6. Ymiskt.

Allir tryggingartakarar í P/F Tryggingarfelagnum Føroyum eru limir í felagnum og hava rætt at møta á aðalfundinum, men skulu í seinasta lagi 5 dagar frammanundan aðalfundin skrivliga boða høvuðsskrivstovu felagsins frá luttøku.

Tórshavn, 23. februar 2011
Nevndin

OGNARFELAG TRYGGINGARTAKARANNA

Kongabrúgvin | Postsmoga 329 | FO-110 Tórshavn | www.trygging.fo



